


# Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI
TEKNISKI SKÚLIN

## Leiðslumenning
heyst 2007

**Grundleggjandi leiðaraútbúgving við nýggjum broytingum** hold 12
**96 tímar 24; 25; 26. sept. 22; 23. okt. 12; 13. nov. 10; 11; 12. des. 14; 15. jan. 2008 kl. 09.00-16.00**
Útbúgvingin vendir sær til nýggjar og komandi leiðarar. Vilt tú hava eitt størri leiðslufakligt støði, so er útbúgvingin nakað fyri teg. Royndir leiðarar, sum hava fingið nýggjar arbeiðs- og leiðslufunktiónir kunnu eisini taka hesa útbúgving.
**Tilmeldingarfreist: 10. sept. 2007 ella so leingi pláss er eftir**

**Coaching** hold 7
**24 tímar 1; 2; 24. okt. kl. 09.00-16.00**
Seinastu árini er vorðið alt greiðari, hvussu umráðandi tað er, at leiðarin kennir coach-amboðini.
Við tí professionellu samrøðuni sum amboð lærir leiðarin at arbeiða tilvitað við menning av sínum starvsfólkum. Øll kunnu læra at gerast ein góður coach.
**Tilmeldingarfreist: 17. sept. 2007 ella so leingi pláss er eftir**

**Persónlig førleikamenning** hold 4
**24 tímar 9; 10. okt. og 6. nov. kl. 09.00-16.00**
- hevur tú skil á tínum egnu sterku síðum?
- hevur tú eina mynd av, hvussu onnur uppliva teg?
- sjálvsálit í tín virkisstíl og førleikar økir um tín møguleika at virka betur.

Skeiðið gevur tær eina mynd av tínum persónligu førleikum og hvørja atferð ein oftast velur - og íblástur, ítøkilig amboð og persónliga sparring til virkni og menning.
**Tilmeldingarfreist: 25. sept. 2007 ella so leingi pláss er eftir**

**Diplomleiðaraútbúgving** hold 6
**320 tímar, byrjar 11. okt. kl. 09.00-16.00**
**Brúka nýggja leiðsluvitan beinanvegin!**
Á diplomleiðaraútbúgvingini fært tú ikki bert lærdóm inn í høvdið. Okkara grundregla er, at tú samstundis tekur støðu til nýggju vitanina og síðani brúkar hana á arbeiðsplássinum, har tú dagliga starvast sum leiðari. Við øðrum orðum: Diplomleiðarar sleppa í lestrartíðini at broyta teori til praksis.
Útbúgvingin verður roknað sum ein góð barlast hjá leiðarum - serliga teimum, sum hava arbeitt við leiðslu, men enn ikki hava nomið sær eina útbúgving innan starvsfólkaleiðslu.
**Tilmeldingarfreist: 27. sept. 2007 ella so leingi pláss er eftir**

**Stress Workshop Nýtt!** hold 1
**16 tímar 11. okt. og 7. nov. kl. 09.00-16.00**
Við støði í tínum gerandisdegi fært tú nøkur ítøkilig amboð til at leggja dent á tínar møguleikar.
- teknikkir at fyribyrgja, finna og handfara stress
- tilvitan um egnu tekin, orsøkir, strongd og atburð
- teknikkir at brúka tekin og atburð hjá tær og øðrum konstruktivt og uppbyggjandi ístaðin fyri niðurbrótandi.

**Tilmeldingarfreist: 27. sept. 2007 ella so leingi pláss er eftir**

**Grundleggjandi projektleiðaraútbúgving** hold 13
**48 tímar 30; 31. okt. 20; 21. nov. 11; 12. des. kl. 09.00-16.00**
Á flestu stovnum og fyritøkum verða uppgávur í alt størri mun skipaðar sum verkætlanir, tí er umráðandi, at leiðarar og lyklastarvsfólk duga projektleiðslu.
Arbeiðir tú við projektum, so er útbúgvingin nakað fyri teg. Skift verður ímillum modul, ið vara 2 dagar og heimauppgávur, ið taka støði í tínum egnu projektum og sum samantvinna teori og praksis.
**Tilmeldingarfreist: 16. okt. 2007 ella so leingi pláss er eftir**

**Innanhýsis skeið**
Innanhýsis skeið verða skipað í tøttum samstarvi við kundan.
Fyrimunir við innanhýsis skeiðum
eru m.a., at kundin hevur møguleika sjálvur at velja evni, tíð og stað
- undirvísingin er tillagað tørvin hjá luttakarunum, stovninum ella fyritøkuni
- uppgávur og dømi frá gerandisdegnum verða nýtt
- innanhýsis skeið eru bíligari fyri hvønn luttakara

**Lesið meira um skeiðini á *www.skeidsdepilin.fo* ella ringið 318813, tilmeldast kann beinleiðis á heimasíðuni.**

Marknagilsvegur 75, Postrúm 3239, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo,
www.skeidsdepilin.fo

# SUNNUDAGSSKÚLIN

## í Ebenezer



**byrjar aftur sunnudagin 26. august kl. 12:00.**

**Verið hjartaliga vælkomin og bjóðið øðrum við eisini.**



# Urðardansur og barnatiltøk

í Kvívík 25. august 2007



**Tann vælumtókti urðardansurin verður við bátahylin í Kvívík tann 25. august.**

**Vit byrja dagin kl. 15:00 við tombola, fiskibrunnum, barnaróðuri (um viðrar), grønum pannikøkum v/litaðum róma, kaffi, ísi og pylsuvogni.**

**Kl. 18:00 verður barnadansur.**

**Kl. 21:00 er møguleiki at keypa grillaðar kjøtbúffar v/salati saman við hugnaligum tónleiki frá teimum vælumtóktu harmonikutónleikarunum í Kvívík, ið hita upp til dansin, sum byrjar kl. 22:00, har LM-BAND spælir (aldursmark: 14 ár).**

**Um viðrar koma motorsúkklur frá MC-felagnum til Kvívíkar kl. 16:00.**

**Komið til Kvívíkar og havið eitt gott og hugnaligt kvøld/nátt saman við okkum!**

**KSR & Bygdarfelagið Glæman**